tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2016 |
| Fundardagur | 14. oktober 2016 kl. 16:00-16:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Hallur í Heiðunum, Marjun Olsen, Jens Johannesen, Marit Poulsdóttir og Mortan Thormann Vang (eykalimur fyri Anitu Vibergsdóttir)

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Skattainntøkur 2016 | 2 |
| 2 | Støðutakan til umbøn um meir-fígging til liðugt-gerð av Saltsilo-verkætlanini | 2 |
| 4 | Uppskot til reglugerð fyri flogfenaðhald | 4 |
| 5 | Framhald av leigusáttmála millum Suðuroyar Sjúkrahús, Fámjins, Hvalbiar og Tvøroyrar kommunu | 5 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2016 |
| Fundardagur | 14. oktober 2016 kl. 16:00-16:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-1-16**

## 1. Skattainntøkur 2016

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattainntøkur í september og í árinum sum heild.

### Skjøl

- Skattur 2016.xlsx
- Álíkning pf-skattur.pdf
- Samanbering av skatti 2015-2016.xls

### Avgerð

Býráðið tók kunningina hjá borgartjóranum til eftirtektar.

**20.13.00-I00-1-16**

## 2. Støðutakan til umbøn um meir-fígging til liðugt-gerð av Saltsilo-verkætlanini

### Málsfrágreiðing

Fígging manglar í sambandi við liðugt-gerð av Saltsilo-verkætlanini á Drelnesi. Sambært Tummasi Sørensen, verkætlanarleiðara, vísir síðsta uppgerð, at 7,6 mió. kr. mangla í fyri at gera arbeiðið liðugt. Hetta er ein framroknað endalig upphædd til at gera ymisk arbeiði liðug innan- og uttandura.

A.P. Møller Grunnurin hevur sent bræv til Saltsilo-Grunnin, sum Tvøroyrar kommunua hevur fingið avrit av, har tað stendur skrivað, at A.P. Møller Grunnurin vil veita ein eyka fíggjarligan stuðul til liðugt-gerð av Saltsilo-verkætlanini á 3. mió. kr. við tí fyritreyt, at Tvøroyrar kommuna stuðlar verkætlanini við somu upphædd.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2016 |
| Fundardagur | 14. oktober 2016 kl. 16:00-16:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**xxx mælir til,**

**Býráðið, 14. september 2016, pkt. 1:**

Jens Johannesen mælir til, at málið verður beint aftur í fíggjarnevndina til at umrøða møguligar fíggingarleistir í mun til, at Tvøroyrar kommuna kann veita meir-fígging til liðugt-gerð av verkætlanini. Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum hjá Jens Johannesen.

**Fíggjarnevndin, 21. september 2016, pkt. 1:**

Kristin Michelsen mælir til, at Tvøroyrar kommuna, vísandi til bræv frá A.P. Møller Grunninum, dagfest 1. september 2016, stuðlar liðugt-gerð av Saltsilo-verkætlanini við 3. mió. kr. Henda upphædd fíggja við 1. mió. kr. av rakstrinum í 2016 og 2. mió. kr. av rakstrinum fyri januar 2017.

Bjarni Hammer og Hallur í Heiðunum mæla til, at aðrir møguleikar fyri fígging, heldur enn yvir raksturin hjá Tvøroyrar kommunu, verða kannaðir eitt nú í samstarvi við Saltsilo-Grunnin, Løgtingið, Fíggjarmálaráðið og privatar íleggjarar.

Bjarni Hammer vil hava viðmerking um, at hann heldur tað vera sera óheppið, at aðrir fíggingar-møguleikar, eigaraviðurskifti og um tað er møguligt, at gera brúk av rakstrarjáttanini í 2017 til íløgur, ikki verða kannaðir nærri áðreenn málið verður lagt fyri Býráðið til støðutakan.

**Býráðið, 23. september 2016, pkt. 1:**

Borgarstjórin kunnar um, at hann hevur sent fyrispurning til Fíggjarmálaráðið um nøkur viðurskifti í sambandi við veitan av stuðli til Saltsilo-verkætlanina. Svar er ikki enn komið frá Fíggjarmálaráðnum. Tí verður málið tikið av skrá á hesum fundinum, og tikið upp aftur til nýggja viðgerð á einum býráðsfundi seinni.

**Fíggjarnevndin, 14. oktober 2016, pkt. 8:**

Kristin Michelsen mælir til, at Tvøroyrar kommuna veitir stuðul á 3. mió. kr. til liðugtgerð av Saltsiloini, sum verður fíggja við 1. mió. kr. av rakstrarstuðlinum í 2016 og við 2. mió. kr. av rakstrarstuðlinum fyri 2017.

Hallur í Heiðunum og Bjarni Hammer taka støðu til stuðulin á býráðsfundinum í dag og ynskja, at heitt verður á Saltsilogrunnin, um at fáa nýggjasta roknskapin til vega.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2016 |
| Fundardagur | 14. oktober 2016 kl. 16:00-16:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Tilmæli frá borgarstjóranum til atkvøðugreiðslu:

6 býráðslimir tóku undir við tilmælinum frá borgarstjóranum: Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Hallur í Heiðunum, Mortan Thormann Vang, Marjun Olsen og Marit Poulsdóttir.

Jens Johannesen atkvøddi ikki.

Býráðið samtykti sostatt, at veita stuðul á 3. mió. kr. til liðugtgerð av Saltsilo-verkætlanini.

### Skjøl

- Notat í sambandi við fund við nevndarformannin í Saltsilogrunninum
- Notat - kunning av forkvinnuni í mentanarnevndini um viðurskifti kring Saltsilogrunnin
- Telefonnotat - samrøða við advokat Eyðbjørn Larsen
- Svarskriv frá Fíggjarmálaráðnum til Tvøroyarr kommunu
- Kunning um, at umsitingin hjá Tvøroyrar kommuna nú fer at kanna, um møguleikar eru fyri at gera bro.
- Skriv til Fíggjarmálaráðið við spurningum við atliti til Saltsilo-verkætlanina á Tvøroyri.
- Yvirlit yvir semju 14.09.2015.pdf
- 7. Byggeprisen endelig-Oversigt 15.09.2016.doc
- Aftale TG Verk og SF 15.09.2016.doc
- Fremskrevet byggeregneskabsoversigt 21.09.2016.pdf

**09.18.01-G01-1-16**

## 4. Uppskot til reglugerð fyri flogfenaðhald

### Málsfrágreiðing

Klaga frá borgara, sum hevur viðført, at tekniska deild hevur arbeitt við at tillagað reglugerð um flogfenað, sum er galdandi í Tórshavn.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 12/2016 |
|---|---|
| Fundardagur | 14. oktober 2016 kl. 16:00-16:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Tekniska nevnd/ umhvørvisnevnd, 5. september 2016, pkt. 2:**
Tekniska deild tillagar reglugerðina fyri flogfenaðhald úr Tórshavn, og málið verður lagt fyri Býráðið 14. september 2016.

### Avgerð

Reglugerðin úr Tórshavn fyri flogfenað verður tillagað viðurskiftini á Tvøroyri og tikin upp til nýggja viðgerð á einum komandi býráðsfundi.

### Skjøl

- Reglugerð fyri flogfenaðhald 2

**03.09.18-A00-2-16**

## 5. Framhald av leigusáttmála millum Suðuroyar Sjúkrahús, Fámjins, Hvalbiar og Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

Sum framhald av verandi leigusáttmála, dagfestur 2. oktober 1994, er semja gjørd við sjúkrahússtjóran hin 1. september 2016, at hækka ásetta leigugjaldið frá 1. januar 2017 við at gjalda í leigu kr. 635,- pr. fermetur + ljós og hita. Núverandi gjald er kr. 5.000,- mánaðarliga. Nýggja gjaldið er kr. 12.700,- mánaðarliga + áleið kr. 5.000,- til ljós og hita.

**Fíggjarnevndin, 14. oktober 2016, pkt. 2:**

Fíggjarnevndin tekur undir við nýggja gjaldinum til leigusáttmála við Suðuroyar Sjúkrahús í sambandi við kommunulækna-viðtaluhølini og beinir málið víðari til staðfestan í Býráðnum.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt nýggja gjaldið fyri kommunulækna-viðtaluhølini.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2016 |
| Fundardagur | 14. oktober 2016 kl. 16:00-16:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Skjøl

- Leigusáttmálin til undirskrivingar



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2016 |
| Fundardagur | 14. oktober 2016 kl. 16:00-16:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2016 |
| Fundardagur | 14. oktober 2016 kl. 16:00-16:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 16:50**

Kristin Michelsen

Bjarni Hammer

Hallur í Heiðunum

Mortan Thormann Vang

Marjun Olsen

Jens Johannesen

Marit Poulsdóttir



Formansváttan